

## Avbjóðarar liggja fram við

Val er í Føroya Fiskimannafelag á hvørjum ári, antin felagsformansval, sýsluformansval ella sóknarformansval.

Felagið er soleiðis skipað við felagsformanni, sýsluformonnum og sóknarformonnum.

Í ár er felagsformansval, og tað merkir, at skip og sóknir havi høvi at stilla valevni upp.

Lóg felagsins sigur, at ”maður er uppstillaður sum felagsformansevni, um 5 sóknir/ skipsmanningar skjóta hann upp”.

Lagt verður aftrat, at ”við vali av felags-og sýsluformonnum hevur hvør sókn rætt til at stilla upp ein mann. Við vali av felagsformanni hava eisini limirnir umborð á teimum skipum, sum eru burtur, tá ið uppstillingin fer fram, rætt til at stilla upp ein mann”.

Seinasta freist at boða frá uppstilling til felagsformansval í Føroya Fiskimannafelag er 4. desember klokkan 16, og skal uppstillingin vera váttað av sóknarformanni ella álitismanni hjá manningini.

Valskeiðið byrjar 1. februar.

Líkt er til, at sitandi felagsformaður, Óli Jacobsen, sum hevur verið ímyndin av FF ein hálvan mansaldur, fer at fáa onkran avbjóðara hesaferð.

Í gjár fingu vit at vita, at Dan R. Petersen, sum býr í Fuglafiði, verður uppstillaður, og somuleiðis fættist, at Jan Højgaard, sum býr á Toftum, eisini ætlar at bjóða seg fram.

**-vilmund.**

# skrivar søgu um rokskipara



*Absalon Absalonsen fór til skips sum 15 ára gamalur og hevur verið á sjónum í meira enn hálva øld*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Jóan Petur hjá Mouritsi livdi í árunum 1894-1963, og hann upplivdi soleiðis alla slupptíðina. Í bókini umrøður Absalon Absalonsen eisini beiggja Jóan Petur, Dánjal hjá Mouritsi og sonin, Mourits hjá Jóan Peturi*



*Tað var við Yvonnu í 1931, at Jóan Petur hjá Mouritsi setti met í snørisveiði, tá ið teir fiskaðu stívliga 3100 skippund í eitt ár*

sambært høvundanum ein sáttligur og lítillátin maður, sum ongan háva gjørdi burtur úr sær sjálvum.

– Kortini duldi hann ikki fyri, at hann eina ódnarnátt í havsneyð á Suðurlandinum upplivdi tað besta, honum nakrantíð var fyri.

Høvundurin sigur, at hesa náttina upplivdi rokskiparin, at ”tann livandi Guð og Kristi fullgjørda verk á krossinum gjørdist hansara álit í einum og øllum”.

Hóast bókin um Jóan Petur hjá Mouritsi ikki er útkomin í skrivandi løtu, er Óli Jacobsen, formaður í Føroya Fiskimannafelag, sloppin at lesa hana, og í seinasta broti í hesi greinini verður tikið saman um tað, sum Óli skrivar.

**Virðismikið íkast**

– Umráðandi er at fáa fest á blað søguna hjá okkara fiskimonnum, so unga ættarliðið kann læra, at grundarlagið fyri teirra vælferð er livi-og arbeiðskorini hjá teirra forfedrum, sum ikki kunnu sammetast við umstøðurnar hjá teimum, sum nú liva.

Óli Jacobsen heldur, at henda bókin soleiðis er eitt virðismikið íkast.

– Hetta er fyrst og fremst ein lýsing av einum av okkara fremstu fiskimonnum, men eisini ein lýsing av okkara fiskiveiði og umstøðunum hjá fiskimonnum fyrra partin av undanfarnu øld. Slíkur lesnaður skuldi verið sjálvskrivaður innan skúlagott, heldur formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, Óli Jacobsen, um bókina hjá Absaloni Absalonsen.